Reglugerð
fyri
stuðul til viðarvøkstur

Endamál

§ 1. Reglugerðin ásetir treytir fyri nýtslu av konto nr. 18.33.2.05 Træplanting.

Stk. 2. Játtanin kann nýtast til stuðul til frama fyri viðarvøkstur fyri at fríðka um lendi, skapa lívd og rekreativ økir, umframt at verja ímóti jarðarmáan.

Stuðulstreytir

§ 2. Stuðul kann veitast kommunum, einstaklingum, feløgum og virkjum.

Stk. 2. Stuðul verður bert veittur til verkætlanir, har gróðursetta lendið (t.v.s. tann parturin av einum lendi, ið verður gróðursettur við viðarvøkstri), er størri enn 2.000 m2.

Stk. 3. Stuðul skal nýtast til verkætlanir, ið kunnu metast at hava alment gagnligt endamál,

Stk. 4. Stuðul sum ikki er nýttur innan 31. desember, fellur burtur. Eftir umbøn kann tilsagnarfreistin í serligum førum verða longd við upp til 4 mánaðir eftir árslok.

Stk. 5. Frágreiðing um úrslitið av verkætlanini skal latast Umhvørvismálaráðnum tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagi 20. februar eftir lokið fíggjarár.

Serligar verkætlanir

§ 3. Tá ið Umhvørvismálaráðið metir tað vera átrokandi, at heilt ávísar verkætlanir verða framdar, kann ráðið seta í verk hesar verkætlanir við fígging útvegað av játtanini til træplanting.

Stk. 2. Tá ið Umhvørvismálaráðið setur í verk verkætlanir, kann tað gerast við almennari lýsing í fjølmiðlunum, ella við beinleiðis samskifti við serfrøðingar.

Umsókn

§ 4. Fyri 2023 skulu umsóknir um stuðul vera Umhvørvismálaráðnum í hendi til lýstu freist, annars í seinasta lagi 1. februar á hvørjum ári. Lýst verður á heimasíðuni hjá ráðnum www.umhvorvi.fo.

Stk. 2. Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

Stk. 3. Umsóknir skulu skrivast á oyðublaðið "umsóknarblað til stuðul til viðarvøkstur", sum er tøkt á heimasíðu ráðsins. Aðrar viðkomandi upplýsingar fyri umsóknina og verkætlanina kunnu leggjast við sum fylgiskjøl til umsóknarblaðið.

Stk. 4. Móttiknar umsóknir verða sendar Umhvørvisstovuni, og, tá ið tað verður mett neyðugt, øðrum viðkomandi pørtum til ummælis, sum millum annað skulu tryggja, at innræsnar (invasivar) plantur ikki verða nýttar.

Útgjald

§ 5. Stuðulin verður útgoldin tá Umhvørvismálaráðið hevur móttikið verkætlanarroknskap.

Stk. 2. Verkætlanarroknskapurin skal lúka treytirnar í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Gildiskoma

§ 6. Henda reglugerð kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer reglugerð til frama fyri viðarvøkstur frá 23. januar 2020 úr gildi.

Umhvørvismálaráðið, 11. apríl 2023

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

/Pól Egholm
aðalstjóri